# Løgmaður hitti týðandi fólk í Brússel

**Á vitjanini í Brússel fyrst í vikuni, hitti løgmaður, Jóannes Eidesgaard, týðandi fólk innan ES, EFTA og NATO**

VITJAN
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Eftir fundin, sum løgmaður hevði við Laszlo Kovács, ES-nevndarlim, helt Jóannes Eidesgaard, at góðir møguleikar eru fyri at víðka um samstarvið við ES.

Tað er Laszlo, ið varðar av sáttmálanum millum Føroyar og ES.

Á hesum fundi legði løgmaður serliga dent á møguleikarnar at víðka samstarvið millum Føroyar og ES innan gransking, útbúgving og flogferðslu.

Løgmaður spurdi eisini ES-nevndarlimin, nær skipanin viðvíkjandi samsavnan av uppruna – tann sonevnda kumuleringsskipanin – verður klár at seta í gildi.

Í Brússel hevði løgmaður eisini fund við ES-nevndina um at víðka sáttmálan við ES, soleiðis at hesin eisini kemur at fevna um útbúgving og gransking. Nevndin tók væl ímóti ynskjum løgmans og er sinnað at virka fyri at fremja hesi mál saman við Føroyum.

Handilsviðurskiftini millum Føroyar og ES sum heild vórðu eisini umrødd á fundinum við ES-nevndina. Umframt at skifta orð við Laszlo Kovács, ES-nevndarlim og ES-nevndina annars, hitti løgmaður eisini ES-nevndarlimin í landbúnaðarmálum, Mariann Fisher Boel.

Jóannes Eidesgaard og Mariann tosaðu eisini um framtíðarsamstarvið millum Føroyar og ES.



*Í Brússel hitti Jóannes Eidesgaard ES-nevndina og ES-nevndarlimir. Á myndini taka løgmaður og ES-nevndarlimurin, Laszlo Kovács, í hondina á hvørjum øðrum*

*Mynd: Hákun Djurhuus*

### NATO-aðalskrivarin

Í Brússel hitti løgmaður NATO-aðalskrivaran, Jaap de Hoop Scheffer.

Á hesum fundi kunnaði hann aðalskrivaran um føroysku sjónarmiðini í sambandi við trygdar-og verjupolitikk, og um hvussu føroyingar meta seg í NATO-høpi. Hann greiddi eisini Jaap de Hoop frá "Fámjinsskjalinum", har danir staðfesta, at teir vilja virka fyri, at føroyingar fáa ein virknan leiklut í uttanríkis-og verjupolitiskum málum. Jóannes greiddi frá hernaðarsamtyktini í fjør vár, har løgtingið samtykti, at føroyingar skulu hava meira innlit í hernaðar-og verjumál.

Jóannes Eidesgaard spurdi Jaap de Hoop um radarstøðina á Sornfelli, sum danir ætla at niðurleggja og vísti á, at radarin hevur týdning fyri sivilu loftferðsluna. Aðalskrivarin segði, at hetta er ein avgerð hjá donsku verjuni burtur av, og at føroyingar og danir mugu finna út av hesum í felag.

Sonevnda SSSB-FAR-støðin, sum bretar hava umhugsað at byggja, varð eisini umrødd á fundinum við aðalskrivaran.

### EFTA-fundur

Á vitjanini í Brússel kannaði Jóannes Eidesgaard eisini møguleikarnar fyri tættari samstarvi við EFTA, og í hesum sambandi var fundur millum løgmann og aðalskrivaran í EFTA, William Rossier.

Løgmaður greiddi aðalskrivaranum frá, at landsstýrið í løtuni kannar møguleikan at víðka formliga samstarvið við bæði ES og EFTA.

Á fundinum vísti Jóannes á, at nýggja uttanríkislógin kann gerast rættarliga støðið undir einum tættari samstarvi við ES og EFTA í framtíðini. Hesum vísti aðalskrivarin ikki aftur. Teir báðir vóru á einum máli um at halda fram við at kanna møguleikarnar fyri einum formligum samstarvi.

# Føroyar meira enn fiskur og handil

**- Eitt av endamálunum við tiltakinum hjá løgmanni við fylgi í Belgiu, sum Sendistova Føroya í Brússel skipaði, var at lýsa og marknaðarføra Føroyar úr øðrum sjónarhorni enn fiski og handli, sum vit annars eru kend fyri í ES-høpi. Hetta sigur Páll Holm Johannesen, sum er starvsnæmingur á føroysku sendistovuni í Brússel**

VITJAN
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo



*- Fólk hava sent brøv, og fólk hava ringt. Øll eru á einum máli um, at tiltakið var sera áhugavert og væleydnað, sigur Páll Holm Johannesen á Sendistovu Føroya í Brússel*

- Sendistovan í Brússel hevur fingið hópin av afturmeldingum frá fólki, sum vóru við til móttøkuna í Brússel, bæði frá sendistovum her í býnum og gestum annars, sum vóru við. Fólk hava sent brøv, og fólk hava ringt, og øll eru á einum máli um, at tiltakið var sera áhugavert og væleydnað.

Páll Holm Johannesen, starvsnæmingur á Sendistovu Føroya í Brússel, heldur, at tað við hesum eydnaðist at marknaðarføra Føroyar úr einum øðrum sjónarhorni, enn landið vanliga kent fyri í ES-høpi.

### Føroysk mentan

- Eini 70-80 fólk, sum á ymiskan hátt hava tilknýti til ES-kervið í Brússel, vórðu við til móttøkuna.

Við móttøkuna greiddi løgmaður frá um Føroyar og føroysk viðurskifti, og borðreitt varð við alskyns føroyskum brellabitum úr sjónum, sum dugnaligi kokkurin, Birgir Enni, stóð fyri.

- Føroyski maturin hevði stóran áhuga og varð ógvuliga væl móttikin av gestunum, sum ikki hildu seg aftur. Gestirnir vóru eisini rættiliga hugtiknir av føroyska ølinum, sum Føroya Bjór hevði latiðtil tiltakið.

Páll sigur, at sum ikki einaferð bergtók Eivør gestirnar við sínum serstaka sangi, eins og Kári Svensson og Sámal Toftanes settu sín dám á við teirra listarligu evnum og málningum.

- Eg haldi, at tað við hesum eydnaðist okkum ógvuliga væl at lýsa og marknaðarføra Føroyar á ein øðrvísi hátt, enn vit vanliga plaga at gera.

Páll sigur, at við móttøkuna varð dentur lagdur á tann partin av okkara mentan, ið snýr seg um føroyskan mat, tónleik og list.

### Fleiri fundir

Føroysku umboðini við móttøkuna vóru løgmaður, Jóannes Eidesgaard, Marjun Hanusardóttir, stjóri á Løgmansskrivstovuni, Herluf Sigvaldsson, Sigmundur Isfeldt, Birgir Enni, Eivør Pálsdóttir, Kári Svensson, Sámal Toftanes og føroyingarnir á sendistovuni í Brússel, Hákun Djurhuus, sum leiðir sendistovuna og Páll Holm Johannesen, starvsnæmingur.

Óli Samró, sum kom úr Haag og Bjørn Kunoy, sum lesur í Belgiu, vóru eisini við til móttøkuna.

Páll Holm Johannesen sigur, at løgmaður kom til Brússel sunnukvøldið, sum móttøkan var týskvøldið.

- Jóannes Eidesgaard var á fleiri fundum mánadagin og týsdagin, har hann hitti ymiskar ES-myndugleikar, sum umsita millum annað fisk, gransking og útbúgving. Somuleiðis hitti hann aðalskrivaran í Nato, Jaap de Hoop Scheffer og aðalskrivaran í EFTA, William Rossier.